# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Jonhard á Skansa

13. juli 1935 – 10. juni 2006

**in memoriam**



*Tað bróta brot so sorgarvond*
*á Syðrugøtusandi,*
*tí heintaður í Harrans hond*
*er enn ein lívsins andi.*

---

*Eg kendi teg ei fyrr enn nú,*
*tú sjúkur lást á beði,*
*og tó frá sjúkralegu tú*
*oss gøddi væl við við gleði.*

*Um stúrin onkur bros ei bar,*
*tú reystligani mælti,*
*at kúrur fyri lívið var,*
*sum grind í dovnum salti.*

*Tú einusinni sligin varð*
*við herviligum happi,*
*og tó tú lagnu tína bar,*
*sum reystur avrekskappi.*

*Tú bardist við tín lista lut*
*í áratíggju tveggja*
*at ongin tína sáru sút*
*í sinn sær skuldi leggja.*

*Eg sá tey koma hvønn ein dag,*
*tey øll um lív títt vóru,*
*og tú, við tínum ljósa lag,*
*tit saman mótburð bóru.*

*Tú segði mær um lívið títt,*
*um børn og konu kæra,*
*har alskur átti støðið sítt*
*at laða lívsins varða.*

*Tú segði mær um barnabørn,*
*um tvíburðar, sum báðir*
*for abban vórðu vælavørn*
*heilt frá, teir vóru smáir.*

*Tú glaður vart um alt títt hús,*
*um øll, tú rópti tíni,*
*sum um teg stóðu heil og fús,*
*nú lív títt fór um sýnu.*

*Eg visti ei, at nos enn vond*
*so nær for framman lógu,*
*sum slíta skuldu lívsins bond,*
*har vit í stovu lógu.*

*Tú vart so tolin, í tær lá*
*ein sælur lívsins farri,*
*tí trúfastur í tíni trá*
*var hægri lívsins Harri.*

*Tú fórst um deyðans feigdarflúr*
*við lívsins vón í vænti,*
*sum mangan annan góðan túr,*
*ið tínum heimi tænti.*

---

*Nú livir eftir minnið títt*
*so glæsiligt í vavi,*
*har heim og vinur, hvør fekk sítt,*
*av tínum lívsins havi.*

---

*Eg takki, at tað untist mær,*
*nú liðugt er at dansa,*
*at lagnan læt mær minnir kær,*
*frá Jónhardi á Skansa.*

*Um bróta brot á Gøtusand,*
*nú Jónhards lív er farið,*
*so dagar upp um lón og land,*
*hans vakri minnisvarði.*

**pmp**

## Andlát og jarðarferðir

**Petur Pauli Danielsen, Tórshavn**, vanliga nevndur **Petur á Hvítanesi** andaðist á Landssjúkrahúsinum 19. juni, 92 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Benny Forná, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 18. juni, 50 ára gamal. Bønarhald verður í landssjúkrahúskapellinum mikudagin 21. juni, kl. 18. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju hósdagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið ynskja at minnast Benny, kunna lata eina gávu til børnini; konta í peningastovnunum.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri pápi, beiggi og abbi okkara

**Benny Forná**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 18. juni
50 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
mikudagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
hósdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Guðrun, Beinta, Rúni, Ranvá og Birita**

*Tey, ið ynskja at minnast Benny kunnu lata eina gávu til børnini á konto í peningastovnunum.*

# Løgtingsmaður fann sær brúður



Mánadagin 19.juni giftust í Vesturkirkjuni John Johannessen, løgtingsmaður í Havn, og Ragnhild Olsen úr Sandavági.

Brúdleypið varð hildið saman við familjuni, og nú eru tey farin til Grikkalands á brúdleypsferð.

## Tøkk

Hjartans tøkk vil eg veita øllum, sum mintust meg, nú eg fylti 70. Tað var hugaligt, at so mong kundu vera við henda dagin. Takk fyri gávur, blómur, telegramm, uppringingar og vøkur orð í sangi, talu og á skrift.

Eina serstaka tøkk til tey, sum fyrireikaðu dagin og tóku sær av øllum.

**Blíðar heilsanir**
**Freydis Poulsen**